LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 13. desember 2024
J. nr.: 24/28015-2

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-061/2024 eftir § 52 a í tingskipanini um Fast Track-skipanina, frá Árna Skaale, løgtingsmanni

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Er tað tilætlað, at ein útlendingur, sum kemur til Føroya at arbeiða umvegis Fast Track skipanina, kann fáa samfylgjandi maka og børn við til Føroya, at samfylgjandi maki kann søkja um uppihaldsloyvi samstundis, sum tann, sum kemur her at arbeiða, og at samfylgjandi makin uttan treytir kann arbeiða, hvar tað skal vera, meðan hetta ikki er galdandi fyri tann, sum er orsøkin til, at familjan kemur til landið?

2. Hvussu metir landsstýrismaðurin um avleiðingarnar av skipanini, serliga talið av útlendingum, sum koma inn umvegis skipanina sum samfylgjandi familja?

3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at endurskoða treytirnar fyri, at samfylgjandi familja hjá útlendingum í Fast Track skipanini fær arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum?

4. Kann landsstýrismaðurin upplýsa á leið, hvussu long tíð gongur frá tí, at útlendingur missir arbeiðið, til málið um at taka arbeiðs- og uppihaldsloyvið aftur er liðugt viðgjørt?

Svar:

Til spurning 1
Reglurnar fyri samfylgjandi familju eru tær somu uttan mun til, um talan er um samfylgjandi familju til ein útlending (høvuðspersón), ið hevur vinnuligt uppihaldsloyvi eftir vanligu mannagongdini í arbeiðsmálum, ES-skipanini ella Fast Track-skipanini. Útgangsstøðið í øllum útlendingamálum er at søkjast skal um loyvið, áðrenn útlendingurin kemur higar, men samfylgjandi familja hjá útlendingum við ítróttarloyvi, loyvi eftir ES-skipanini og Fast Track-skipanini kunnu tó, eins og høvuðspersónurin, sleppa at lata umsóknina inn, meðan tey eru stødd í Føroyum, um so er, at tey hava gildigt ferðavisum ella rætt til visumfrítt tilhald í Føroyum. Treytirnar eru so at siga einans, at samfylgjandi familjan býr saman við høvuðspersóninum, og at høvuðspersónurin kann uppihalda familju sína fíggjarliga.

Tað eru bara hjúnarfelagin/samlivin og børn undir 18 ár, sum kunnu vera samfylgjandi familjulimir, og tað er ein treyt, at tey livdu saman við høvuðspersóninum, áðrenn viðkomandi kom higar at arbeiða. Sambært § 14, stk. 1, nr. 7 í útlendingalógini eru útlendingar við uppihaldsloyvi sum samfylgjandi familja frítiknir fyri krav um arbeiðsloyvi í Føroyum. Samfylgjandi familjan kann sostatt arbeiða so nógv ella lítið, sum tey ynskja, og kann harafturat taka starv hjá fleiri ymiskum arbeiðsgevarum í senn, um teimum lystir.

Høvuðspersónar við vinnuligum arbeiðsloyvi eru komnir til Føroyar at arbeiða, tí tørvur er á arbeiðsmegi teirra. Vinnuliga arbeiðsloyvið er treytað av, at høvuðspersónurin hevur fingið bjóðað starv hjá eini fyritøku, sum er góðkend frammanundan, og sum lýkur treytirnar fyri, at týðandi lønar- og setanartreytirnar eru vanligar eftir føroyskum viðurskiftum, so sum teir vanligu 40 arbeiðstímarnir um vikuna.

Høvuðspersónurin er høvuðsuppihaldari hjá samfylgjandi familju síni. Samfylgjandi makin er ikki høvuðsuppihaldari, og tí verða ikki somu treytir settar samfylgjandi makanum. Men tað er ein fyrimunur, um samfylgjandi makin eisini fær starv í Føroyum, tí hetta betrar um uppihaldsgrundarlagið hjá familjuni og er við til at nøkta tørvin á arbeiðsmegi, sum er í Føroyum í dag.

Til spurning 2
Endamálið við at geva uppihaldsloyvi til útlendingar, sum eru samfylgjandi familja hjá einum útlendingi, sum er komin higar at arbeiða, er heilt yvirskipað, at tað ikki skal tarna arbeiðsgevarum at útvega sær útlendsk starvsfólk av tí orsøk, at starvsfólkið ikki kann fáa húski sítt við henda vegin. Hetta atlitið ger seg eisini galdandi, tá talan er um at fáa útlendska arbeiðsmegi eftir Fast Track-skipanini, sum er ein skjótari og smidligari skipan fyri arbeiðsgevarar í Føroyum at útvega sær útlendska arbeiðsmegi.

Á sumri 2023 kundi staðfestast, at talið á útlendingum, sum komu til Føroyar sum samfylgjandi familja, var meira enn tvífaldað, síðan Fast Track-skipanin kom í 2021. Hetta hevði m.a. við sær, at skúlar og barnagarðar vóru overvaðir av útlendskum børnum, sum ikki dugdu føroyskt. Landsstýrismaðurin gjørdi tí av at broyta treytirnar fyri, nær útlendingar við vinnuligum uppihaldsloyvi í Føroyum, kunnu fáa familju sína við sær til Føroyar við at áseta inntøkumørk í útlendingakunngerðina fyri Føroyar. Endamálið var m.a. at tryggja at útlendingar við vinnuligum arbeiðsloyvi í Føroyum, sum hava familju sína við sær, eru førir fyri at uppihalda familjuni.

Sambært tølum frá Udlændinge- og Integrationsministeriet í november í ár sær út til, at inntøkumørkini, sum vórðu sett á heysti 2023, hava havt við sær, at talið av samfylgjandi familjulimum er minkað nógv í 2024 í mun til tey bæði undanfarnu árini, har Fast Track-skipanin hevur verið í gildi. Tølini síggjast í niðanfyristandandi talvu:

Tabel 4. Førstegangstilladelser til medfølgende familie til erhverv på Færøerne i perioden 2019 – 13. oktober 2024* fordelt på top 10 nationalitet

	2019	2020	2021	2022	2023	2024*
Filippinerne	1	3	8	32	64	26
Rumænien	12	4	1	18	4	5
Serbien	10	11	6	5	2	1
Polen	1	1	7	9	4	5
Indien	7	1	7	3	3	2
Kroatien	0	1	6	3	2	1
Albanien	1	2	0	6	3	
Thailand	0	0	0	2	6	3
Tunesien	0	0	2	3	3	1
Nepal	0	0	0	3	6	0
Øvrige	21	16	11	40	29	8
I alt	**53**	**39**	**48**	**124**	**126**	**52**

* Tallene for 2024 er foreløbige og til og med den 13. oktober 2024

Anm.: Generelt bemærkes, at de statistiske oplysninger er behæftet med usikkerhed, da udlændingesystemerne er opbygget som journaliserings- og sagsstyringssystemer og ikke som egentlige statistiksystemer. Endvidere bemærkes, at der er tale om antal tilladelser og ikke personer. Det betyder, at den samme person kan indgå flere gange over tid i forbindelse med en ny opholdstilladelse.

Kilde: Styrelsen for International Rekruttering og Integration

Til spurning 3

Tað er danska Útlendinga- og Integratiónsmálaráðið sum, eftir samráðing við landsstýrið, ásetur nærri reglur um arbeiðsloyvir í Føroyum undir hesum, hvørjar treytir eru knýttar at arbeiðs- og uppihaldsloyvum og harvið eisini treytirnar fyri samfylgjandi familju. Vísandi til svar míni omanfyri meti eg, at tiltøkini við inntøkumørkum, sum landsstýrið setti í verk á heysti 2023, tæna sínum endamáli.

Eg havi sett mær fyri, at krav verður sett útlendskum arbeiðstakarum um at vísa revsiváttan, tá ið teir søkja um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum. Tað verður í løtuni arbeitt við hesum málinum.

Eg ætli mær at taka avbjóðingarnar við talinum á samfylgjandi familjulimum upp við danska ráðharran í útlendinga- og integratiónsmálum, fyri at finna út av, hvørji krøv kunnu setast á økinum, t.d. nøktandi málførleikar, og at tað skal ganga eitt ávíst tíðarskeið, áðrenn samfylgjandi familja kann koma til Føroyar.

Til spurning 4

Útlendingastovan upplýsir, at tað tíverri ikki ber til at upplýsa á leið, hvussu long tíð gongur frá tí, at útlendingur missir arbeiði, til málið um at taka arbeiðs- og uppihaldsloyvið aftur er liðugt viðgjørt. Tað eru ov nógv viðurskifti, sum kunnu ávirka málsviðgerðartíðina, m.a. hvussu skjótt útlendingurin og arbeiðsgevarin boða útlendingamyndugleikunum frá um uppsøgnina, um tað tá

er stutt ella long tíð, til loyvið gongur út, umframt um útlendingurin allíkavæl hevur rætt til at uppihalda sær í Føroyum á øðrum grundarlagi.

Harafturat kemur, at Fast Track-skipanin og ES-skipanin treytað sera stuttar málsviðgerðartíðir, Hesi málini, sum eru nógv flest í tali, skulu tí raðfestast fram um øll hini málini.

Løgmálaráðið 13. desember 2024

Bjarni K. Petersen
landsstýrismaður